# Miðnámsrit

10 juni 2016

## Um blaðið

Góði lesari!

Í tíggjunda Miðnámsriti eru seks greinir. Olav hevur eina um floksstøddir. Kanningar hava víst, at flokkar við umleið 16 næmingum læra meira enn flokkar við umleið 24 næmingum, men tær vísa eisini, at spurningurin um floksstøddir snýr seg um javnstøðu og javnrættindi.

Hesa ferð hava vit sett rektaranum á Glasi, Boga Bech Jensen, og rektaranum á Miðnámi á Kambsdali, Pálli Isholm, nakrar spurningar um avbjóðingar og møguleikar í at leggja skúlar saman í deplar og um mangt annað.

Paula Gaard hevur skrivað eina grein, hon nevnir *Tann vakri váðin í útbúgving*. Hon kemur m.a. inn á, at tað at undirvísa merkir at tora at vága. At undirvísa merkir at vera menniskjaligur og at góðtaka tann grundleggjandi veikleikan, sum liggur í hesari meiningsfullu og kreativu tilgongdini, sum vit kalla útbúgving.

Tórður hevur eina grein um próvtøl. Hann vísir á, at næmingar og lærarar hava lyndi til at leggja í so stóran dent á próvtøl, og at hetta kann forða fyri læring. Hann mælir til, at lærarar flyta fokus frá døming til læring.

At enda hevur Olav skrivað um eina føroyska kanning, sum vísir, at dreingir klára seg lutfalsliga betur til próvtøkur enn gentur. Hann setir spurningin, um próvtøkur diskriminera ávísar næmingar.

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

# Innihaldsyvirlit

**Hvussu nógvir næmingar skulu vera í einum skúlaflokki? Olav Absalonsen** 3

**Spurningar til Boga Bech Jensen, rektara á Glasi, Tórður Johannesarson** 9

**Spurningar til Páll Isholm, rektara á Miðnámi á Kambsdali, Tórður Johannserson** 12

**Tann vakri váðin í útbúgving, Paula Gaard** 15

**Próvtøl køva læringina í skúlunum, Tórður Johannesarson** 20

**Klára dreingir seg betur til próvtøkur enn gentur? Olav Absalonsen** 24

# Hvussu nógvir næmingar skulu vera í einum skúlaflokki?

Olav Absalonsen

**Í øllum samfeløgum er spurningurin, hvussu stórir skúlaflokkar skulu vera, áhugaverdur og átrokandi at tosa og hugsa um; og tað eru tvær orsakir til tað: Onnur er, at floksstøddin hevur týdning fyri, hvussu nógv tann einstaki næmingurin fær burturúr; og hin er, at floksstøddin hevur týdning fyri, hvussu nógvan pening tað almenna nýtir til skúlar og útbúgving. Tá ið avgerðir skulu takast um floksstødd, mugu hesi bæði atlit vigast upp ímóti hvørjum øðrum. Tað er lætt at rokna út, hvussu nógv meira fleiri og smáir flokkar kosta enn fáir og stórir. Tað er ikki líka lætt at finna út av, hvussu nógv meira ella minni næmingurin hevði fingið burturúr, um flokkurin, hann gongur í, hevði havt eina aðra stødd.**

## Baumol's cost disease

Í sonevndum ídnaðarsamfeløgum við høgum kostnaðarstigi eru lønir nógv hægri enn í øðrum samfeløgum, ið hava minni arbeiðsframleiðni, tí so hvørt sum eitt samfelag fær sær meira framkomin framleiðslu- og veiðitól, og infrakervið verður útbygt, gerst framleiðslan av vørum meira arbeiðsproduktiv og bíligari, og vinningurin av hesum verður størri. Vinningurin skal býtast millum framleiðslufaktorar, sum til dømis eru arbeiðsmegi, real-kapitalur (framleiðslu- og veiðitól) og tilfeingi. Hvussu býtið skal vera, verður avtalað millum partar á arbeiðsmarknaðinum. Søgan sigur, at lønarlagið veksur, sum frá líður, tá ið framleiðslan pr. arbeiðstíma veksur, ella at tað kann vera øvugt, og hugurin at gera íløgur veksur, tá ið lønarlagið er høgt (Robert Allen); men samanhangið er tað sama.

Produktivitetur veksur ikki líka nógv í øllum vinnum. Í tænastuvinnum ber ikki til at økja um arbeiðsproduktivitetin so nógv sum í flestu vøruframleiðandi vinnum, og í summum tænastuvinnum krevur tænastan serliga arbeiðsmegi, sum ger, at framleidnið kann ikki økjast. Hann kann kanska økjast við at lata dygdina fara, men so er talan um vánaliga tænastu, og hon kann altíð vera bíligari. Í summum førum er lágur produktivitetur mettur at vera tað sama sum dygd.

Í einum samfelag, har produktiviteturin veksur nógv í nøkrum vinnum, men minni í øðrum vinnum, hendir tað, at lønirnar hækka í teimum vinnum, har produktiviteturin veksur. Men av tí at arbeiðsmarknaðurin er tann sami, hækka lønirnar eisini í teimum vinnum, har produktiviteturin ikki fylgir við. Sostatt fer ein broyting fram í hesum

samfelag, soleiðis at summar vørur gerast bíligari, meðan aðrar vørur ella tænastur gerast dýrari, mált í keypiorku. Sum nevnt, eru tænastuvinnur ofta arbeiðstungar, og tí gerast tænasturnar dýrari. Eitt annað, sum hendir, er, at í vinnum, har produktiviteturin veksur, er brúk fyri minni arbeiðsmegi, og tí fara fleiri fólk at arbeiða í tænastuvinnum. Hetta fyribrigdið verður á eingilskum kallað *Baumol's cost disease* eftir William J. Baumol (f. 1922), professara í mikrobúskapi (Jonathan Aldred).

Um vit fara víðari við teimum hugsanum, ið eru lýstar frammanfyri, so kunnu vit nevna dømi um tænastur, ið eru vorðnar dýrari í Føroyum og aðrastaðni. Nógvar av hesum tænastum kunnu vit keypa frá privatum fyritøkum. Aðrar eru fríar tænastur, ið kunnu fáast frá tí almenna; heilsuverkið er eitt dømi og skúlaverkið eitt annað. At heilsuverkið og skúlaverkið tyngja búskapin nógv, er ikki tí, at tað almenna stendur fyri teimum, men av tí at tey veita arbeiðskrevjandi tænastur, gerast tær dýrar, so hvørt sum lønarlagið í samfelagnum hækkar. Eitt dømi hjá Baumol er tónleikaframførsla: Framleidnið hjá tónleikarum, ið skulu framføra eina strúkikvartett hjá Mozart, hevur verið tað sama, síðani hon varð skrivað. Hon krevur fýra tónleikarar, og hon tekur somu tíð at spæla nú, sum tá ið hon varð skrivað (Jonathan Aldred).

## Er spurningurin búskaparligur?

Onkuntíð verður ført fram, at tá ið talan er um floksstøddir í skúlum, eiga vit ikki bara at hugsa búskaparliga, men eisini námsfrøðiliga. Meiningin í hesum er helst at vísa á, at tað, sum næmingurin lærir meira av at ganga í einum lítlum flokki, vigar upp ímóti tí, sum tað kostar meira beint nú at hava smáar flokkar. Men í búskaparfrøði verður slíkur málburður ikki brúktur. Tá ið talan er um búskaparligar avgerðir av hesum slag, verður cost-benefit reglan nýtt, um avgerðin skal vera skilagóð, og tað er hon, um inntøkan av avgerðini er størri enn kostnaðurin: nyttan av, at næmingurin lærir meira, er inntøkan sambært hesi hugsan.

Spurningurin um floksstøddir er tískil búskaparligur burturav. Tað, at vit hava skúlar í samfelagnum, er tekin um, at tað loysir seg. Skúlar eiga at geva samfelagnum meira, enn teir taka. Spurningurin um floksstøddir verður ofta gruggaður av, at fíggjarkarmar skulu haldast beint nú, og vit duga ikki at síggja framtíðarvinningin av avgerðum á hesum øki. Fíggjarkarmar kunnu føra til sparingar, sum seinni kosta meira enn tað, ið verður spart. Hinvegin kann eisini hugsast, at ein meirnýtsla ikki gevur tað aftur í framtíðini, sum hon kostar nú.

## Hvat siga kanningar?

Tað kann vera sera trupult at gera av, hvussu floksstøddir kunnu ávirka lærdómin. Spyrt tú lærara, fært tú ofta tað svar, at um flokkurin er lítil, fær hann gjørt tí einstaka

næminginum eina størri tænastu, men fer flokkurin upp um ávísa stødd, so er persónlig tænasta ikki møgulig, og so kann flokkurin tað sama vera nógv størri. Hetta sjónarmið er óivað orsøkin til, at hægri skúlar hava stórar fyrilestraflokkar við fleiri hundrað næmingum, men eisini nakrar heilt smáar flokkar, har undirvísingin er løgd eftir tørvinum hjá tí einstaka.

Í stórum londum ber til at gera stórar kanningar av, hvussu floksstøddin ávirkar læringina. Í Føroyum er ikki so lagaligt at gera stórar kanningar av hesum slag, tí tær kosta nógv at gera, og næmingatalið er ov lítið. Tí er tað ikki av leið at hyggja at, hvat útlendskar kanningar siga um hetta. The Center for Public Education, stytt CPE, er stovnur undir NSBA, ið er felagsskapur fyri skúlastýri í USA. Á heimasíðuni hjá CPE hava tey gjørt eina samanbering av nøkrum kanningum um floksstødd í skúlum. Les meira um hesar kanningar niðanfyri.

## STAR-prosjektið

Ein av hesum kanningum var STAR-prosjektið í Tennessee, sum byrjaði í 1985. Fyrsta stigið í STAR (Student-Teacher Achievement Ratio) var ein 4-ára kanning í barnagarði, fyrsta, øðrum og triðja flokki, har flokkar við 13-17 næmingum vóru samanbornir við flokkar við 22-25 næmingum í hvørjum flokki við einum lærara í hvørjum flokki og við flokkar við 22-26 næmingum við einum lærara og einum hjálparlærara. Umleið 6.500 næmingar í 330 flokkum í 80 skúlum vóru við í kanningini at royna næmingarnar í lesing, støddfrøði og grundleggjandi læriførleika. Eftir 4 árum var greitt, at smáir flokkar førdu til munandi meiri læring, og at fyrimunurin við smáum flokkum var dupult so stórur fyri børn í samfelagsligum minnilutum (Jayne Boyd-Zaharias). Eisini vísti kanningin, at gentur høvdu størri fyrimun av at vera í smáum flokkum enn dreingir. Nyttan av at hava ein hjálparlærara í einum vanligum flokki var einans 35% av nyttuni av at hava smáar flokkar við einum lærara í hvørjum (Frederick Mosteller).

Annað stigið í STAR byrjaði í 1989 og skuldi vita, um teir fyrimunir, sum vórðu staðfestir á fyrsta stigi, stóðu við. Her vísti tað seg, at næmingar, sum byrjaðu skúlagongdina í smáum flokkum, og sum síðani fóru í størri flokkar, hildu fram við at klára seg betur enn floksfelagar, sum byrjaðu skúlagongdina í størri flokkum. Triðja stigið í STAR var at geva teimum 17 fátækastu skúlaøkjunum í Tennessee smáar flokkar í forskúla, fyrsta, øðrum og triðja flokki. Eftir hetta fóru tey 17 skúlaøkini frá at vera langt undir miðal í lesing og støddfrøði til at vera oman fyri miðal av teimum 139 skúlaøkjunum í Tennessee (Frederick Mosteller).

## Aðrar kanningar

Ein onnur kanning var SAGE-prosjektið í Wisconsin, sum byrjaði í 1996. SAGE (Student Achievement Guarantee in Education) nýtti 4 sløg av smáum floksstøddum:

1. 15 næmingar við einum lærara
2. 30 ella færri næmingar í einum flokki við tveimum lærarum
3. Ein skúlastova við einum fyribils skilaveggi, og 15 næmingum og einum lærara hvørjumegin veggin
4. 30 næmingar við einum lærara, men við einum lærara afturat í lesing, máli, list og støddfrøði

SAGE kom til niðurstøður, ið líktust niðurstøðunum hjá STAR um at minka floksstøddir tey fyrstu árini í skúlanum (Jeremy Finn). Næmingar í SAGE-flokkum fingu munandi betri úrslit í lesing, máli, støddfrøði og tilsamans, enn næmingar í vanligum flokkum. Sjálvt um SAGE-næmingar høvdu verri avrik undan kanningini enn næmingar í størri flokkum, so høvdu SAGE-næmingar munandi betri avrik eftir kanningina, sum vísir, at næmingarnir í minnu flokkunum gjørdu størri framstig enn næmingar í vanligum flokkum. Framstigini hjá afrikanskum amerikanarum vóru nógv størri enn hjá hvítum.

CSR-programmið í Kalifornia byrjaði í 1997. CSR (Class Size Reduction) var eitt átak at minka um floksstøddir í forskúla, fyrsta, øðrum og triðja flokki í statinum Kalifornia. Her var kravið, at ein lítil flokkur skuldi vera 20 næmingar ella minni. Frammanundan var floksstøddin um 29 næmingar í miðal. Ætlanin hevði við sær, at umleið 12.000 nýggir lærarar vórðu settir í starv. Upprunaliga var ætlanin ikki at kanna, hvussu átakið fór at ávirka læring og avrik, hóast átakið kom at kosta eina milliard dollarar meira um árið. Tá ið kanningin kortini bleiv gjørd, var bara møguligt at kanna triðja flokk, tí í hinum árgangunum vóru ov fáir stórir flokkar at samanbera við.

CSR vísti, at næmingarnir í teimum smærri flokkunum kláraðu seg betur enn næmingarnir í teimum vanligu flokkunum. Hóast munurin var lítil, var hann hagfrøðiliga signifikantur. Av tí at CSR var eitt átak, sum var gjørt knappliga, var neyðugt at seta nógvar nýggjar lærarar, sum ikki høvdu royndir at undirvísa, og hevur hetta eyðvitað ávirkað úrslitið av kanningini, soleiðis at fyrimunurin av smærri flokkum ikki er so sjónskur sum í hinum kanningunum (Jeremy Finn).

## Hví virka smáir flokkar betur enn stórir?

Ein kundi trúð, at dygdin í undirvísingini er betri í smáum flokkum enn í stórum, og at tað kann vera orsøkin til betri læring í smáum flokkum; men sambært Jeremy Finn stuðla kanningarnar ikki upp undir hesa hugsan. Sjálvsagt hevur lærarin eitt sindur meiri tíð til einstaka næmingin í lítlum flokki enn í einum størri, og hann brúkar heldur minni tíð at stýra einum lítlum flokki enn einum størri. Men annars er undirvísingin ikki nógv øðrvísi, og hetta svarar ikki spurninginum, hví smáir flokkar virka betur enn stórir.

Sambært Jeremy Finn vísa kanningar, at tað eru heldur sálarfrøðiligar orsakir til, at næmingar blíva betri næmingar, um teir eru í einum lítlum flokki enn í einum størri. Fyri

tað fyrsta er ein næmingur í lítlum flokki alla tíðina noyddur at taka lut í virkseminum í flokkinum; hann sleppur ikki undan, og lærarin fær heldur ikki ignorerað tann einstaka næmingin. Fyri tað annað verður samanhaldið ofta betri í einum lítlum flokki; lærararnir kenna betur tann einstaka, og næmingarnir stuðla betur hvørjum øðrum, enn teir høvdu gjørt í einum størri flokki. Fyri tað triðja er sosiala ábyrgdin fyri hvørjum øðrum størri í einum lítlum bólki enn í stórari fjøld; hetta er kent frá øðrum samanhangi, og er helst eisini galdandi fyri næmingar í einum skúlaflokki. Og fyri tað fjórða vísa kanningar um dynamikk í bólkum, at normar í smáum flokkum føra til øðrvísi atferð enn í størri flokkum; hesar kanningar vísa, at í stórum bólkum eru færri, sum taka lut í felags virksemi; hetta er helst eisini galdandi í skúlaflokkum.

## Eru útlendskar kanningar nýtiligar í Føroyum?

Vit mugu ganga út frá, at næmingar í Føroyum líkjast næmingum í øðrum londum, og at læringin verður ávirkað av umstøðunum á sama hátt. Hinvegin hava vit nógvar smáar skúlar í Føroyum, og tá er spurningurin um at minka um floksstøddina ikki so viðkomandi. Og í nøkrum førum eru skúlar og flokkar ov smáir. Aðrar kanningar, sum ikki eru nevndar omanfyri, eru komnar til, at um flokkar eru heilt smáir, so kann tað ganga út yvir læringina. Orsøkin til hetta er, at næmingar læra eisini saman og av hvørjum øðrum, og um flokkurin verður heilt lítil, missir hann henda dynamikkin (Borland et.al 2005).

Men í teimum skúlunum í Føroyum, har flokkar eru so stórir, at teir svara til stórar flokkar eftir teimum útlendsku kanningunum, er viðkomandi at taka spurningin um at minka skúlaflokkar í álvara. Hetta kann koma fyri í stórum skúlum á grundnámi ella miðnámi. Sambært kanningunum er serliga nógv at vinna, um skúlaflokkar ikki eru stórir tey fyrstu tvey ella trý skúlaárini í barnaskúlanum. STAR-kanningin samanbar eisini smáar flokkar við einum lærara við stórar flokkar við tveimum lærarum, og her var niðurstøðan, at læringin var nógv størri í teimum smáu flokkunum. Eftir tí at døma er tað ikki skilagott at hava stórar flokkar við tveimum lærarum, tí umframt at læringin verður minni, kostar tað líka nógv ella meira.

Vit skulu heldur ikki bara hugsa um, at tað kostar meira beint nú at hava smærri flokkar tey fyrstu skúlaárini, men eisini hava í huga, at tað lønar seg aftur av tí, at næmingar, sum ganga í smáum flokkum í forskúla og fyrstu tvey skúlaárini, fáa eitt grundarlag, sum ger teir betur førar fyri at nema sær lærdóm seinni, sjálvt um flokkarnir tá eru størri. Tað, sum hetta kostar meira í løtuni, kann roynast at verða ein góð íløga.

Tær amerikonsku kanningarnar vísa, at børn í minnilutabólkum hava størri fyrimunir av at vera í smáum flokkum, enn onnur børn hava. Hesir minnilutabólkar eru til dømis afrikanskir amerikanarar og hispanic/latino amerikanarar. Hetta samsvarar væl við, at summar av kanningunum vístu, at børn úr fátækum korum høvdu størri fyrimunir av at

ganga í smáum flokkum, enn onnur børn høvdu. Tað, sum kanska er eitt sindur meira óvæntað, er, at smáir flokkar gagna gentum meira enn dreingjum.

Hesar síðstu avdúkingarnar seta spurningin um floksstøddir í skúlum í eitt heilt nýtt perspektiv. Nú snýr spurningurin seg ikki bara um at økja lærdómin tilsamans við smærri flokkum, men nú snýr hann seg eisini um javnrættindi og javnstøðu. Hóast minnilutabólkar kanska ikki eru so sjónskir í Føroyum sum aðrastaðni, so eru teir her eisini, og tað er staðfest í nógvum kanningum, at hvussu næmingar klára seg í skúlanum, er í stóran mun treytað av, hvørja bakgrund teir hava. Tí eru tær útlendsku kanningarnar nýtiligar í Føroyum eisini.

## Keldur

Aldred, Jonathan. 2010, The Skeptical Economist, Revealing the Ethics Inside Economics, Earthscan, London.

Allen, Robert C. 2011, Global Economic History, A Very Short Introduction, Oxford University Press, Oxford.

Borland, Melvin V., Howsen, Roy M., Trawick, Michelle W. 2005, An Investigation of the Effect of Class Size on Student Academic Achievement, Education Economics, Vol. 13, No. 1, 73-83, March.

Boyd-Zaharias, Jayne. 1999, Project Star, The Story of the Tennessee Class-size Study, American Educator.

Finn, Jeremy D. 2002, Small Classes in American Schools: Research, Practice, And Politics, Phi Delta Kappan, 551-560, March.

Mosteller, Frederick. 1995, The Tennessee Study of Class Size in the Early School Grades, The Future of Children, Vol. 5, No. 2 – Summer/Fall.

Class size and student achievement: Research review, The Center for Public Education (tikið niður 10. februar 2012): http://www.centerforpubliceducation.org/Main-Menu/Organizing-a-school/Class-size-and-student-achievement-At-a-glance/Class-size-and-student-achievement-Research-review

# Spurningar til Boga Bech Jensen, rektara á Glasi

Tórður Johannesarson

**1. Hvørjar námsfrøðiligar hugsjónir hevur tú um at leggja skúlar saman í deplar?**

Tað at leggja skúlar saman í deplar gevur meining, um næmingarnir fáa námsfrøðiligar og útbúgvingarligar fyrimunir. Eisini gevur tað meining, um lærararnir fáa betri møguleikar at samstarva, deila vitan, mennast fakliga og arbeiða í tvørfakligum verkætlanum við meira. Fyri at hetta skal vera møguligt, er neyðugt, at skúlarnir, sum verða lagdir saman, blíva einans skúli og ikki halda fram at virka sum atskildir skúlar. Eisini er neyðugt, at man loyvir næmingunum at velja sær fak frá tí breiðu viftuni av fakum, sum man kann bjóða út. Hjá okkum leggja vit ein tekniskan skúla, ein handilsskúla og ein studentaskúla saman. Fyri at tað skal geva meining, má tað verða møguligt hjá einum næmingi á einari breyt at velja fak, sum í dag liggja á eini aðrari breyt. Her kann man ímynda sær timburmannin, sum kundi hugsað sær at dugað eitt sindur betur franskt.

**2. Hevur tú nakrar fyrimyndir frá fólkaskúlum ella miðnámsskúlum í sambandi við samanleggingina?**

Eg havi ikki fyrimyndir frá fólkaskúlum ella miðnámsskúlum; tó fylgi eg við, hvussu gongur í nøkrum av donsku samanleggingunum á miðnámsskúlaøkinum. Eg eri eisini so heppin, at Miðnám á Kambsdali er eina tonn framman fyri okkum í sínari samanlegging. Tí fylgi eg eisini væl við har og samskifti regluliga við Páll Isholm, rektara. Tá tað kemur til aðrar samanleggingar, luttók eg í samanleggingini millum DTU og Risø. Har vóru nøkur ting, sum riggaðu væl, og sum eg havi latið meg inspirerað av í sambandi við okkara samanlegging. Eitt nú valdi man at bólka fólk eftir teirra fakligu áhugamálum. Hetta merkti, at fólk við somu fakligu áhugamálum fingu ein felags leiðara. Tað, sum eg skjótt legði til merkis, tá eg bleiv settur, var, at fólk á øllum trimum skúlunum høvdu høgan fakligan stoltleika. Hetta ynski eg at styrkja við at deila starvsfólkini eftir fakligheit heldur enn eftir, hvørjari útbúgving tey undirvísa á. Tað merkir, at málløerarar koma á deild saman, lærarar innan samfelagsfak koma á deild saman o.s.fr., heldur enn studenta-skúlalærarar fyri seg, handilsskúlalærarar fyri seg og tekniskaskúlalærarar fyri seg. Um man ynskir at hyggja út í heim, er samanleggingin millum Pixar og Disney eitt dømi um, hvussu ein samanlegging kann eydnast. Í tí samanleggingini riggaði væl at brúka styrkirnar hvør hjá øðrum, har Pixar vóru serfrøðingar innan 3D telduanimering, meðan

Disney vóru serfrøðingar innan onnur ting, millum annað marknaðarføring. Tann samanleggingin gav meining og riggaði, millum annað tí at leiðslan kláraði at fáa tað besta frá báðum pørtum. Man skal altíð stremba eftir at fáa tað besta frá øllum pørtum, sum verða lagdir saman. Hjá okkum hava vit tríggjar sterkar og vælvirkandi skúlar, og vit mugu tryggja, at vit ikki missa tær styrkirnar í samanleggingini.

**3. Hvørjar visiónir hevur tú fyri nýggja stovnin?**

Mín visjón er, at tá fólk hyggja aftur á sína skúlatíð í fólkaskúla, háskúla, eftirskúla, Glasir, universiteti, víðari útbúgving og eftirútbúgving, so hugsa tey: "Mín tíð á Glasi var mín besta útbúgvingartíð. Har mentist eg mest fakliga og sum persónur." Í teirri visjónini liggur, at vit hava eitt framúr læringsumhvørvi, har vit klára at kveikja lærihugin hjá næmingunum.

**4. Hava myndugleikarnir sett krøv um, hvussu samanleggingin skal gerast?**

Vit arbeiða tætt saman við myndugleikunum í samanleggingini, men myndugleikarnir hava ikki gjørt eina uppskrift um, hvussu hetta skal gerast. Tað er mín ábyrgd og ein ábyrgd, sum eg eyðmjúkt og við áræði átaki mær.

**5. Verður samfelagsnyttan av útbúgvingunum størri við samanleggingum?**

Tað haldi eg, tí vit hava betri møguleikar at laga okkara útbúgvingartilboð til tørvin hjá samfelagnum og vinnuni.

**6. Hvørjar starvsfólkapolitiskar avbjóðingar eru við depilshugskotinum?**

Vit hava nógv ymisk starvsfólk við nógvum ymiskum útbúgvingum, royndum og mentanum, sum øll koma at arbeiða á einum skúla. Starvsfólkini hava ymiskar uppgávur og hava ymiskar mátar at loysa uppgávurnar uppá. Vit koma ikki at hava ein studentaskúla, ein handilsskúla og ein tekniskan skúla; ístaðin koma vit at hava einans skúla. Tað vil siga, at starvsfólk, sum hava hoyrt til teir tríggjar skúlarnar, koma at hoyra til ein og sama skúla. Tað er ikki víst, at øll koma at trívast við hesum, men tað er umráðandi hjá teimum, sum velja at halda fram í nýggja bygninginum, at stuðla undir hesa menningartilgongd, so vit saman fáa lyft uppgávuna og harvið skapt eina sterka kenslu av felagsábyrgd og samanhaldi.

**7. Verður starvsfólkamenning ein partur av tí nýggju organisatiónini?**

Tað verður tað avgjørt! Um vit skulu hava næmingin í sentrum, er neyðugt, at starvsfólkini

trívast. Um starvsfólkini skulu trívast, er neyðugt, at starvsfólkini hava góðar møguleikar at mennast. Vit ynskja tí áhaldandi at menna øll starvsfólk. Hetta er avgerandi fyri starvsfólkatrivnaðin.

### 8. Hvussu fert tú at tryggja, at teir stillu næmingarnir trívast í einum stórum skúladepli?

Stillir næmingar kunnu trívast eins væl á einum stórum skúla sum aðrir næmingar. Ofta hava teir stillu næmingarnir verri við at koma til orðanna í einum stórum bólki, og her er tað umráðandi, at teir fáa møguleika at arbeiða í smáum bólkum, har teirra sjónarmið verða hoyrd. Hóast Glasir verður ein stórur skúli, so kemur læruumhvørvið at vera skipað soleiðis, at øll fáa møguleika at mennast við teimum eginleikum, ið mynda tey. Av tí at skúlin er so stórur, eru eisini góðir møguleikar at finna saman við øðrum, ið hava somu áhugamál sum tú, t.d. ígjøgnum ymisk áhugafeløg fyri lesandi, eins og man sær uttanlands. Á henda hátt er lættari at finna nýggjar vinir, tá ein byrjar í skúlanum.

### 9. Hvørjar møguleikar sært tú við tí nýggja bygnaðinum?

Eg síggi møguleikar fyri, at næmingar kunnu velja ta útbúgving, sum passar best til tann einstaka, uttan at hugsa "men mínir vinir fara…", tí nú koma øll á sama stað. Eg síggi møguleikar fyri, at næmingar kunnu seta sína útbúgving saman, soleiðis at tann einstaki fær fak, sum hann hevur áhuga í. Eg síggi óendaligar møguleikar at samstarva tvørfakliga bæði hjá næmingum og starvsfólki. Eg síggi møguleikar fyri menning av starvsfólki, fyri menning av Føroya fólki gjøgnum lívslanga læring. Eg síggi óendaligar møguleikar og ynski at hoyra um møguleikar frá øðrum.

### 10. Hvørjar vandar sært tú?

Eg síggi ikki vandar – bara møguleikar! Tí havi eg starvsfólk, sum kunnu vísa mær á møguligar vandar, soleiðis at vit kunnu finna loysnir, sum eliminera vandarnar.

# Spurningar til Páll Isholm, rektara á Miðnámi á Kambsdali

Tórður Johannesarson

### 1. Hvørjar námsfrøðiligar hugsjónir hevur tú um at leggja skúlar saman í deplar?

Tað hevur týdning at varðveita fjølbroytni, samstundis sum vit byggja brýr og fremja eina sunna og livandi skúla- og ungdómsmentan. Fakligu profilarnir á breytum og í læru-greinum skulu framvegis standa sterkir og styrkjast, samstundis sum ein felagsmentan skal byggjast upp.

Ein felagsmentan kann t.d. skapast við afturvendandi fakligum tiltøkum, har næmingar leggja fram úrslit. Hetta kann bæði vera eftir breyt, árgangi ella tvørgangandi áhugamálum annars. Felags mentanarlig átøk og tiltøk eru ógvuliga umráðandi. Hetta kann vera eitt felagskór, afturvendandi listaframsýning, temadagar um tíðarbundin evni, politiskir fundir, kvøldsetur o.s.fr..

Týdningarmikið er eisini at skapa góðar relasjónir millum starvsfólk og næmingar. Við góðum relasjónum skapast gróðrarbotnur, holl og varandi læring og almenn búgving og virðing fyri ymiskleikanum, menniskjaliga eins væl og fakliga, og tá hevur depilin meira at bjóða samanlagt, enn gomlu skúlarnir høvdu hvør sær.

### 2. Hevur tú nakrar fyrimyndir frá fólkaskúlum ella miðnámsskúlum í sambandi við samanleggingina?

Tað hava verið nógvar ymiskar samanleggingar í seinastuni, men nakra greiða fyrimynd havi eg ikki í so máta. Heldur eru tað royndir frá samanleggingum av kommunum, ítróttarfeløgum, stovnum og fólkaskúlum, sum hava lært meg, at ein hóvlig tilgongd, har fólkið er við, roynist best í longdini. Sum leiðari er man kanska ótolin og hevur nógvar ymiskar hugsanir um framtíðina, men umráðandi er, at man hevur tol og letur tingini finna eitt natúrligt menningartempo.

### 3. Hvørjar visiónir hevur tú fyri nýggja stovnin?

Visjónin er, at allir næmingar, sum ganga á Miðnámi á Kambsdali gerast búnir borgarar, sum kunnu taka lut í føroyska, norðurlendska og altjóða samfelagnum og menningini frameftir. Felagsskapur, faklig dygd og virðing eru nøkur lyklaorð til at fremja hetta.

**4. Hava myndugleikarnir sett krøv um, hvussu samanleggingin skal gerast?**

Nei, ikki annað enn tað, sum lóggáva og líknandi aðrar bindingar hava við sær. Eg havi fingið rættiliga fríar teymar, og tað er gott.

**5. Verður samfelagsnyttan av útbúgvingunum størri við samanleggingum?**

Ja, sjálvandi. Tú fært ment eitt heilt annað læruumhvørvi. Bara í ár hava vit megnað at sett eitt nógv fjølbroyttari vallærugreinaúrval saman, og møguleikarnir fyri tvørfakligum virksemi eru øktir munandi. Tað, at starvsfólkahópar, sum áður vóru í tveimum, nú kunnu samstarva, hevur avgjørt skapt eitt meira fjølbroytt, spennandi og livandi arbeiðspláss, har fakdidaktiska diskussiónin er styrkt. Sum frá líður, fara vit eisini at síggja eyðsýndar møguleikar, sum ikki sóust fyrr, men tað fer at taka tíð.

**6. Hvørjar starvsfólkapolitiskar avbjóðingar eru við depilshugskotinum?**

Fyrst og fremst er tað kunningin, sum er umráðandi, so øll kenna seg at vera partur av samanleggingini. At fólk skulu venja seg við nýggjar tankar, er natúrligt og eigur at virðast. Tað er tó umráðandi at hava fokus á, at tíðirnar eru broyttar, og tað er ein spurningur um at fara til gongu. Ikki renna, men vera á ferð alla tíðina. Konfliktir og ivaspurningar koma, men umráðandi er at tora at taka tað upp, tora at bakka, um tað er neyðugt, og tora at vera ósamd og kjakast, men alla tíðina við tí fyri eyga at fáa tað besta burturúr fyri næmingin og hansara læru.

**7. Verður starvsfólkamenning ein partur av tí nýggju organisatiónini?**

Avgjørt er starvsfólkamenning ein umráðandi partur. Júst hvussu hetta verður skipað best, er ein áhugaverdur spurningur. Men innanhýsis menning, har lærarar fakliga og námsfrøðiliga styrkja hvør annan, er ein sera umráðandi partur. Hetta kann bæði gerast við supervisjón og innanhýsis smáskeiðum.

Samanleggingin skapar heilt víst nógvar spennandi møguleikar á hesum økinum. Vit skulu minnast til, at á einum skúla sum Miðnámi á Kambsdali er ein ørgrynna av fakligari vitan og námsfrøðiligum royndum savnað á einum arbeiðsplássi. Skapa vit rúm og karmar fyri, at starvsfelagar fáa styrkt hvør annan, so eru møguleikarnir óavmarkaðir.

Størri førleikamenningarætlanir krevja pening, og tað má gerast í samstarvi við Nám og Mentamálaráðið. Seinastu árini er nógv komið burturúr á hesum økinum. Vit hava fingið støddfrøðivegleiðara, lestrarvegleiðaraútbúgving, orðblindalærarar, og praktiski parturin av námsfrøðiligu útbúgvingini av miðnámsskúlalærarum er veruliga komin í gongd aftur.

Hetta hava verið sera góð tiltøk fyri miðnámsskúlan, og vónandi heldur henda menningin fram.

Eitt annað øki, sum er ógvuliga áhugavert at fara undir, er skiftislæraraskipan, har lærarar sleppa at royna seg á øðrum skúlum eitt tíðarskeið, og vit fáa lærarar, ið starvast aðrastaðni, eina tíð. Hetta kann vera bæði stimbrandi fyri læraran, næmingarnar og arbeiðsplássið.

**8. Hvussu fert tú at tryggja, at teir stillu næmingarnir trívast í einum stórum skúladepli?**

Vit skulu leggja dent á dagliga at hava samband við allar okkara næmingar. Eisini teir stillu. Hetta gera vit við, at næmingurin hoyrir til ein flokk, sum so aftur er knýttur at einum toymisleiðara, lærarartoymi og lestrarvegleiðara.

Sum eg segði í byrjanini, so eru positivar relasjónir gróðrarbotnurin fyri øllum á skúlanum. Eisini teimum stillu næmingunum.

Mest umráðandi er, at vit skapa og varðveita eina positiva skúlamentan, sum snýr seg um ein sunnan felagsskap, fakliga dygd og virðing.

**9. Hvørjar møguleikar sært tú við tí nýggja bygnaðinum?**

Eg síggi nógvar møguleikar. Eitt arbeiðspláss við 700 fólkum, ið hava valt at vera partur av einum læruumhvørvi, hevur óavmarkaðar møguleikar. Kunsturin er at halda fast við fakligu dygdina og samstundis fylgja rákum í samfelagnum, serliga á námsfrøðiliga økinum, men sjálvandi eisini í møguleikunum at seta útbúgvingar saman.

**10. Hvørjar vandar sært tú?**

Ein stórur vandi er, at vit ikki megna at brúka tær royndir og ta vitan, sum er arbeidd upp ígjøgnum fleiri áratíggju í nýggja stovninum. Broytingar skulu sjálvandi fremjast, men tað er eingin grund at keypa dýrt keyptar royndir fleiri ferðir.

Ein annar vandi er manglandi virðing fyri fakunum hjá hvørjum øðrum. Umráðandi er at gera ymiskleikan sjónligan í breytunum, lærugreinunum og lærarahópinum, tí fortreytin fyri rúmligheit er, at vit skilja ymiskleikan.

# Tann vakri váðin í útbúgving

Paula Gaard

Heitið "Tann vakri váðin" er lænt frá einari av bókunum, sum eru grundarlag undir tí, sum hesir tankar snúgva seg um. Tað er hollendingurin Gert Biesta, sum er ein viðurkendur granskari innan námsfrøði í okkara parti av heiminum í dag, ið stendur fyri tí. Í bókini *The Beautiful Risk of Education*, sum kom út í 2013, setir Biesta okkara útbúgvingarskipan undir sjóneykuna og setir orð á viðurskifti frá undirvísingarstøðuni, sum á mangan hátt eru í andsøgn við nógv av tí, sum vit møta í sjálvari útbúgvingarskipanini. Eitt orð, sum verður nógv nýtt í dag, er orðið góðskutrygging, og júst hetta orðið lýsir væl, hvørjum vit eru uppi ímóti sum undirvísarar. Orðið lýsir væl tær skipanir, sum vit arbeiða undir, sum síggja stórt í at tryggja og at góðskutryggja. Tað ljóðar so gott og rætt og betryggjandi, men er tað nú tað?

Hvussu heppið er hetta orðið í veruleikanum í mun til undirvísingarstøðuna, og hvat kunnu vit nýta eitt slíkt orð og eina slíka hugsan til? Í øllum førum kunnu vit ikki nýta tað til nakað serliga nógv, tá vit hava við menniskjalig sambond at gera, sum undirvísing jú fyri ein stóran part er. Tað ber ikki til at tryggja sær, at menniskju hava gott samband við hvønn annan, og tað ber ikki til at tryggja sær, at fólk taka væl ímóti onkrum, sum tú kemur við. Tað er nakað, tú kanst arbeiða fyri, men tað er ikki nakað, tú kanst tryggja.

Kortini verður nógv gjørt fyri at royna at tryggja útbúgving. Vit hava námsskipanir, undirvísingarætlanir, undirvísingarfrágreiðingar, formativa og summativa eftirmeting og skeiðskvotu til hvønn einstakan lærara - alt fyri at tryggja útbúgving. Hetta skal ikki misskiljast, tí sjálvandi skulu vit hava hesi. Men seta vit spurningin, um hesi fimm átøk, sum eg havi valt úr rúgvuni, tryggja undirvísing, kunnu vit skjótt verða samd um, at tað gera tey ikki.

Tað gera tey ikki, tí tað ber ikki til at tryggja útbúgving. Og tann, sum heldur, at hann kann tryggja útbúgving, hevur misskilt grundarlagið undir útbúgving. Tann, sum yvirhøvur ynskir ella heldur, at góðskutrygging í undirvísing er verd at stremba eftir, hevur misskilt alt, sum útbúgving og námsfrøði hava sítt grundarlag í.

Hetta er tað, sum Biesta millum annað sigur í bókini, sum teksturin ber heiti av. Hann sigur, at hjartatátturin í útbúgving og námsfrøði er váði og veikleiki. Hesi orðini standa í einari rópandi andsøgn við modernaða yvirskotsorðið góðskutrygging. At undirvísa merkir at tora at vága nakað. At undirvísa merkir at vera menniskjaligur, og at undirvísa merkir, at tú góðtekur tann grundleggjandi veikleikan, sum liggur í hesari meiningsfullu og kreativu tilgongdini, sum vit kalla útbúgving. Og tað er ikki nakað, tú kanst tryggja í excelørkum ella eftirmetingarskjølum.

Váði og veikleiki eru orð, sum vit kanska ikki vanliga seta í samband við nakað positivt, men tey verða ikki sædd sum nakað negativt í hesum høpinum. Tey eru grundleggjandi fortreytir fyri, at útbúgving yvirhøvur kann fara fram. Váðin liggur í at tora at vera menniskja og at síggja næmingin sum menniskja. Váðin liggur í, at læring ikki snýr seg um at fylla eina spann, men at kynda eitt bál, og tað kanst tú bara gera, um tú brennur fyri nøkrum sjálvur. Váðin liggur ikki í møguleikanum fyri, at onkur næmingur fer at miseydnast, tí hann ikki arbeiðir nóg hart, ella tí at hann ikki er nóg motiveraður. Sjálvandi fer tað at henda, men tað er ikki hetta, sum er váðin, sum Biesta tosar um. Váðin er og skal vera har, tí útbúgving ikki er ein interaktión millum robottar, men millum menniskju, og tí vit stremba sum undirvísarar ikki eftir einum einum-til-eitt-sambandi millum tað, sum vit føra inn í undirvísingarstøðuna, og tað, sum vit vóna kemur burtur úr henni. Tvørturímóti! Vit vóna, at tað, sum vit seta í gongd, festir røtur og veksur fram sum nakað enn størri enn tað, vit plantaðu.

Biesta endar sín part av bókini um góðskutrygging í undirvísingini við at siga, at um vit taka váðan burtur úr útbúgvingini, so taka vit grundarlagið undan henni. Tá hesin váðin stendur í slíkari andsøgn við alt tað, sum vil tryggja útbúgving, kann ov nógv fokus á góðskutrygging vera við til at skrykkja grundarlagið undan okkara undirvísingar- og útbúgvingarskipan.

Niðurstøðan er, at undirvísing snýr seg so ella so fyrst og fremst um sambond millum menniskju. Um vit hugsa um okkara heim í dag og alt, sum menniskjað kann ogna sær av vitan frá maskinum, so er kanska tað einasta, vit sum undirvísarar hava fram um maskinurnar, tað, at vit eru menniskju. Vit kunnu fremja nakað, sum er meira enn bara vitan gjøgnum okkara undirvísing. Vit kunnu fremja útbúgving, og útbúgving er meira enn bara vitan. Sambært Biesta er útbúgving eitt tríliðað samband millum vitan, persónleika og menniskjalig sambond, og tað má vera ein javnvág ímillum hesi trý.

Dorte Ågård er ein danskur granskari, sum fæst við týdningin í menniskjaligum sambondum í útbúgving, og í 2014 gav hon bókina *Motiverede relationer* út, har hon vísir á týdningin í sambandinum millum lærara og næming. Hon heldur, at tað í donskum námsfrøðiligum kjaki og undirvísing hevur verið alt ov lítið fokus á menniskjalig sambond og kanska ov nógv fokus á orð sum motivatión, sum koma til at standa ov einsamøll. Hon flytur við sínari doktararitgerð, sum er grundarlag undir bókini, fokus frá motivatión og yvir á menniskjalig sambond og broytir lutfallið millum hesi. Hon ger tey menniskjaligu sambondini til eitt yvirhugtak, sum motivatión hoyrir undir.

Hon tekur útgangsstøði í einum motivatiónshugtaki, sum trýr uppá, at motivatión kann ávirkast. Tað er ikki er nakað, man hevur ella ikki hevur. Tað er nakað, man kann fáa millum annað gjøgnum menniskjalig sambond. Hon vísir til kanningar, sum siga, at

sambond millum næming og lærara hava ávirkan bæði á motivatión, men harvið eisini á læring.

Tað eru eyðsæddir vansar í hesum, tí tað er vist, at tú fert ikki at fáa gott samband við allar tínar næmingar. Men tað hevur týdning, at dentur verður lagdur á, at sambondini altíð eru faklig og ikki privat/persónlig. Tað merkir ikki, at tú ikki brúkar tínar kenslur og títt temperament til at meta um støður v.m. í undirvísingarstøðuni, men tað merkir, at tú altíð hevur eitt fakligt fokus og ikki privat/persónligt, hóast talan er um menniskjalig sambond.

Eitt dømi um eitt amboð í undirvísingini, sum vit kunnu brúka sum motiverandi faktorur, er eftirmetingin. Hon er innbygd so ella so í okkara skipan fyri at góðskutryggja, men hon kann eisini brúkast til at skapa faklig sambond við næmingarnar, har teir kenna seg sæddar og virdar í undirvísingarstøðuni og harvið verða motiveraðir og læra.

Tá eg í einum 1.g eftirmetti innleiðsluna í føroyskum, spurdi ein drongur so glaður, um eg veruliga var áhugað í at hoyra, hvat hann helt. Hetta er ein staðfesting av, at eftirmetingin veruliga kann fáa næmingarnar at kenna seg sæddar og virdar í undirvísingarstøðuni. Hetta er kortini treytað av, at tú gert nakað við tað, sum tú spyrt um; at tú ikki letur eina eftirmeting fara framvið, uttan at tú vísir, at tú tekur hana í álvara og ynskir, at hon fær avleiðingar.

So eg eftirmetti í einum flokki, har eg kendi, at tað ikki gekk so væl. Tað var ein góður flokkur, men eg føldi ikki, at nakað riggaði hjá mær í hesum flokkinum. Eg var nervøs at gera eftirmeting, tí eg væntaði, at næmingarnir fóru at vera øgiliga harðir við meg. Eg spurdi, hvat næmingarnir hildu um undirvísingina, hvat teir hildu um sítt egna avrik og um floksavrikið. Teirra svar vóru heldur frægari enn væntað, og meira enn helvtin av næmingunum søgdu, at undirvísingin hevði verið góð, og restin – øll uttan ein, sum segði, at hon hevði verið tolilig – segði, at hon hevði verið í lagi. Ongin segði, at undirvísingin hevði verið framúr góð, og heldur ongin segði, at hon hevði verið framúr vánalig. Næmingarnir vóru tó minni nøgdir við egið avrik og eisini við floksavrikið.

Tá næmingarnir vórðu spurdir, hvat kundi verið øðrvísi, vóru tað nakrir, sum søgdu, at teir saknaðu meira fjølbroytta undirvísing, og hetta tók eg til eftirtektar. Eftirmetingin varð brúkt til at skipa eina undirvísing, sum var meira fjølbroytt, og upplýsingarnar vórðu nýttar til at seta tiltøk í verk við støði í tí, sum næmingarnir høvdu sagt. Eg vísti teimum, hvat tey sjálvi høvdu svarað og legði fram fyri teimum, hvussu eg ætlaði at broyta gongdina.

Seks mánaðir seinni eftirmetti eg hesa undirvísingargongdina, og tað vísti seg, at næmingarnir høvdu markant broytt fatan av bæði undirvísingini, egnum avriki og floksavriki hetta hálva árið. Flokkurin fór frá at halda undirvísingina vera millum góða og toliliga til at halda hana vera millum framúr góða til at vera í lagi. Egið avrik og floksavrik var farið frá at vera millum vánaligt og gott til at vera millum vánaligt og framúr gott. Her

skal viðmerkjast, at í teirri seinnu eftirmetingini var tað meira enn ein fjórðingur, sum helt undirvísingina nú vera framúr góða, og nógv tey flestu hildu egið avrik og floksavrikið vera gott ella í lagi.

Tá spurt varð um arbeiðshættir, vóru tað kortini sera nógv, sum hildu seg hava fingið mest burtur úr vanligari talvuundirvísing, og tað kann kanska tykjast undarligt, tá tað var tann undirvísingarhátturin, vit brúktu mest frammanundan, og sum tey ynsktu meira fjølbroytni í mun til. Sambært hesum er fjølbroytni sostatt sera týdningarmikið, men tað merkir ikki, at vit eiga at sleppa talvuundirvísingini. Eg tulki hetta úrslitið sum, at tað ikki í so stóran mun vóru sjálv tiltøkini, sum vórðu sett í verk, sum vóru avgerandi fyri, at næmingarnir nú vóru betur nøgdir, men eins nógv tað, at teir vóru tiknir upp á ráð og sæddir og høvdu avgerðarrætt. Teir vórðu bodnir við í eitt fakligt samstarv, har teir høvdu týdning og vórðu sæddir. Og eg meti, at tað hevur gjørt ein mun, eins og tiltøkini sjálvandi eisini hava tað.

Skalt tú brúka eftirmetingina á henda hátt, er tað týdningarmikið, at tú setir spurningar sjálvur sum lærari og bara spyrt, tá tú ert klárur at gera broytingar. Tí tá kanst tú tosa um motiverað faklig sambond í undirvísingini. Ein toppstýrd eftirmeting við standardiseraðum spurningum kann ikki á sama hátt nýtast sum amboð í undirvísingini. Undir øllum umstøðum er tað týdningarmikið, at eftimetingar ikki verða gjørdar og lagdar í eina skuffu onkustaðni. Tað førir ikki við sær, at næmingar kenna seg sæddar og virdar - heldur tvørturímóti, tí so hevur tú spurt teir, hvat teir halda, men kortini ikki tikið teir við upp á ráð.

Hetta er bert eitt dømi um, at eitt arbeiðsamboð – eftirmetingin – bert er eitt arbeiðsamboð. Tað kann nýtast á rættan hátt, men tað kann eisini nýtast á skeivan hátt. Tað kann vera við til at geva fantastisk námsfrøðilig úrslit, men tað kann eisini skaða undirvísingarstøðuna við at gera, at næmingarnir missa álit á skipanini, um teir verða hoyrdir, men fáa eina kenslu av, at teir ikki verða tiknir við upp á ráð.

Eg billi mær ikki inn, at nakað nýtt er í hesum, sum er ført fram, men eg billi mær inn, at tað hevur stóran týdning, at tað verður kastað ljós á hesi viðurskifti. Tað er týdningarmikið, at váðin í útbúgving verður settur upp ímóti góðskutryggingini, sum fyllir so nógv í skipanini, tí hjartatátturin í undirvísing - váði og veikleiki - kann ikki tryggjast. Vit kunnu arbeiða hart fram ímóti at vera góðir lærarar, sum útføra ta bestu undirvísingina, men tað snýr seg um at vága nakað og ikki um at tryggja tað. Misskilja vit hetta, taka vit ikki bara feil, men vit skrykkja grundarlagið undan okkara undirvísingar- og útbúgvingarskipan.

Til stuttleika at enda – í mun til hetta ikki at koma við nøkrum nýggjum - kann hóskandi verða víst til, hvat føroyingar søgdu um motiverað sambond fyri 125 árum síðani, uttan tó at júst hetta heitið varð nýtt:

*Nú væntast meiri av skúlinum. Skúlin skal ikki aleina læra børnini, men eisini uppfostra teirra sinni uttan at kúga kroppin. Tað má ikki leggjast dent uppá at læra so og so nógv uttanat, men mest uppá at læra tey at skilja millum rætt og órætt, læra tey at brúka sínar egnu tankar og vekja teirra hug til at nema allan nyttuligan upplýsning, sum kann koma teimum væl við í eftirtíðini.*

## Keldur

Biesta, Gert J.J. *The Beautiful Risk of Education*. 2013

Ågård, Dorte. *Motiverede relationer*. 2014

*Føringatíðindi*. 1890

# Próvtøl køva læringina í skúlunum

Tórður Johannesarson

## Jagstranin eftir høgum próvtølum

Gransking innan ungdóm vísir, at tey ungu trívast ikki so væl í skúlunum longur, tey eru strongd, og tey mistrívast, tí tey alla tíðina skulu avrika í skúlanum, og tí tey jagstra eftir høgum próvtølum. Fyri at fáa høg próvtøl velja tey ungu tær lættastu uppgávurnar. Tey velja lærugreinir og evnir til uppgávur, har møguleiki er at fáa eitt gott próvtal – hetta kann ávirka læringina. Næmingar brúka meiri orku at royna at bergtaka læraran enn at spyrja um tað, sum teir ikki skilja.

Jagstranin eftir høgum próvtølum skapar eina keðiliga læringsmentan. Næmingar í fólkaskúlanum og á miðnámi halda, at próvtølini hava nógv at siga. Teir hava ikki so djúpan hugburð til at læra sum fyrr. Teir grunda ikki á spurningar fyri sína egnu skuld, men heldur fyri at fáa høg próvtøl – teir hugsa strategiskt. Í grein í Miðnámsriti 6 stendur, at næmingar við djúpum hugburði at læra eru beinleiðis motiveraðir og intellektuelt forvitnir, og tað er tað, sum ger teir ídnar, heldur enn møguleikin fyri onkrum óbeinleiðis vinningi. Teir síggja útbúgving sum eina sjálvsagda menning og sum framhald av øðrum royndum. Strategiskir næmingar gera tað, sum skal til fyri at fáa góð próvtøl. Teir hava grunnan hugburð, um tað er nóg mikið, og djúpan hugburð, tá ið tað krevst. Grunnir næmingar (teir, sum pragmatiskt góðtaka umstøðurnar) eru vanliga óbeinleiðis motiveraðir. Teirra mál er at fáa okkurt slag av førleika, og teir góðtaka alt í lærubókum og í fyrilestrum. Teirra motiv og mál kunnu vera at fáa eitt arbeiði eftir loknan lestur. Gransking vísir, at næmingar við djúpum hugburði klára seg nógv betur enn næmingar við grunnum hugburði, bæði í próvtølum og í læringsúrtøku. Sambært kanningum vísir tað seg, at jagstran eftir próvtølum styðjar undir grunna læring.

Í danskari kanning svaraðu lærarar, sum vórðu spurdir um próvtøl og hugburð, at teir góvu próvtøl, sum í størsta mun eru bygd á virkni, hugburð og eitt sindur á fakligheit. Nógv av próvtølunum vórðu givin eftir, hvussu virknir næmingarnir vóru í undirvísingini, og eftir hugburði sum heild. Hetta gevur teimum ekstrovertu ein stóran fyrimun, sum kenna "próvtalsspælið" millum lærara og næming, kanska tí at teir koma frá einum heimi, har teir hava lært "próvtalskoturnar" frá barnsbeini. Í grein á tollaksmessu í fjør vísir Morten Mikkelsen til kanningina, ið Tanja Miller, sum undirvísir á UC Nordjylland hevur skrivað, at fleiri lærarar royna at brúka próvtøl námsfrøðiliga í teirri vón, at próvtølini koma at ávirka atferðina. Sambært Tanju er hetta eitt váðaverk, tí at næmingarnir eru ymiskir og hava ymiskar royndir. Hon vísir á, at fyri summar næmingar virkar eitt vánaligt próvtal motiverandi. Aðrir kenna eitt vánaligt próvtal sum eitt brennimerki, sum teir

ongantíð sleppa av við: "Um eg fái eitt 4-tal, so eri eg verdur eitt 4-tal!". Onkursvegna byrja hesir næmingar at identifisera seg við próvtalið. Hon mælir til, at hesi støðumetini, sum næmingar fáa í árinum, mugu broytast til metingar- og vegleiðarasamrøður. Hon og fleiri onnur halda, at næmingar bara skulu hava próvtøl, tá ið teir hava verið til royndir og próvtøkur.

Spurningurin er, hví tey ungu munnu vera so upptikin av at fáa høg próvtøl. Næmingar á framhaldsdeild stremba eftir teimum høgu próvtølunum, so teir sleppa á miðnám. Næmingar á miðnámi jagstra tey, so teir sleppa á hægri lærustovnar.

Tað vísir seg tó, at hetta er yvirdrivið, tí í flestu førum eru miðalgóð próvtøl nóg mikið til at sleppa at lesa víðari. Spyrt tú tey ungu, so svara tey aloftast, at tey vilja hava góð próvtøl, so tey hava lívsdreymin í eygsjón. Lars Geer Hammershøj, lektari í námsfrøðiligari heimsspeki á Århus Universiteti, heldur, at tey ungu hava eina fatan av eini polarisering millum vinnarar og taparar – og hava ein ótta fyri at detta í ta skeivu kategoriina: "Tey vilja hava góð próvtøl, ikki fyri at stíga fram sum tann góði, men av ótta fyri at standa sum tapari. Tað er óttin fyri ikki at liva upp til idealið." Orsøkin er sambært Hammershøj einstaklingsgerðin nú á døgum.

## Kanning um hugburð til at læra

Ein kanning varð gjørd á Føroya Handilsskúla í 2008, sum snúði seg um próvtøl og hugburð til at læra. Greinin stendur í Miðnámsriti 5. Lærarar og næmingar eru spurdir um afturmeldingar frá lærarum um skrivlig avrik. Har kemur fram, at flestu lærarar ivast í, um próvtøl eru motiverandi, helvtin av spurdu lærarunum ivast í, um próvtøl ikki einans skuldu verið givin seinast í skúlaárinum. Sambært kanningini heldur ein meiriluti av næmingunum, at lág próvtøl gera, at teir fara at taka seg saman, men teir eru meira ymiskir á máli, hvørt góð próvtøl fáa teir at verða róligar. Ein meiriluti av lærarunum heldur, at góð próvtøl gera næmingarnar róligar, men bara ein minniluti trýr, at góð próvtøl gera, at teir kenna seg góðtiknar. Ein meiriluti av lærarunum heldur, at lág próvtøl gera, at næmingar kenna seg vrakaðar, men bara ein minniluti heldur, at góð próvtøl gera, at teir kenna seg góðtiknar. Flestu næmingar seta próvtøl í samband við avrik og ikki við persónin, men bara helvtin av lærarunum ger tað. Næmingarnir eru spjaddir í spurninginum, um próvtøl eru persónlig, men flestu lærarar halda, at næmingar sum heild taka próvtøl persónliga, eins og granskingin hjá Tanju Miller vísti.

## HH3 – fyrsta árið uttan próvtøl

Mínar royndir sum lærari hava sýnt, at næmingar taka próvtøl persónliga. Eg havi ofta upplivað, at næmingar kasta frá sær, tá ið teir fáa lág próvtøl. Tey fyrstu árini sum lærari upplivdi eg, at næmingar løgdu einki í viðmerkingarnar, sum eg gav teimum, men vóru

bara áhugaðir í próvtølum. Í fleiri førum sóu næmingarnir bara próvtalið, og kundu ilskast um próvtalið uttan at lesa viðmerkingarnar til uppgávurnar.

Tá ið HH3 byrjaði í 2007, legði toymið stóran dent á eftirmeting. Vit vildu flyta fokus frá próvtølum til læring, tí at próvtøl í summum førum kunnu forða fyri læring. Vit gjørdu av, at næmingar fyrsta árið ikki sóu nakað próvtal. Hjá summum lærarum helt hetta fram líka inn í næsta skúlaárið. Toymið var tilvitað um, at skuldi tað eydnast, so máttu allir lærarar standa saman. Eingin mátti geva næmingunum eitt tað einasta próvtal í eitt heilt ár, tó avgjørdu lærarar, sum høvdu C-lærugreinir, at próvtøl vórðu givin eftir jól fyrsta árið.

Næmingarnir vóru eitt sindur argir, tí at teir søgdu seg ikki vita, hvar teir flutu. Vit greiddu teimum væl frá, hví vit gjørdu hetta, og samstundis vildu vit leggja størri dent á eginmeting. Vit søgdu teimum, at vit saktans kundu fortelja teimum, hvar ið teir flutu fakliga, uttan at próvtøl skuldu gevast. Summir næmingar skiltu hetta væl, meðan aðrir hildu uppá, at teir vildu hava próvtøl líkamikið hvat. Ein av lærarunum spurdi, hvat teir skuldu brúka próvtølini til? Onkur nevndi okkurt um víðari lestur, og at tað var gott at vita, um **hon var** eitt 8-tal ella 10-tal. Lærarin fortaldi teimum, at próvtøl siga einki um, hvat teir duga. Hann gav teimum eitt dømi um tveir næmingar, sum kjakaðust um sambandið millum Føroya og Danmarkar. Annar kom við skilagóðum grundum, meðan hin kom við, at hann fekk 11 í samfelagsfrøði, og at tað mátti verið nóg góð grundgeving. Næmingarnir sóu tað láturliga í hesum.

Vit í toyminum skiltu sera væl, at næmingarnir vóru ørkymlaðir, tí at teir vóru vanir við at fáa próvtøl sum einasta slag av eftirmeting gjøgnum fleiri ár í fólkaskúlanum. Vit varnaðust eisini skjótt í byrjanini, at lærarar bæði í toyminum og uttan fyri toymið vóru ikki heilt álvuligir við ikki at geva próvtøl, tí teir høvdu gingið í fólkaskúla, miðnámsskúla og á fróðskaparsetri, har tað var nóg mikið við einum próvtali, sum næstan var ein heilag eftirmeting. Knappliga skuldu teir góðu tankarnir, sum vit høvdu lært í ástøðiliga partinum í námsfrøði, gerast til veruleika: vit skuldu flyta fokus frá próvtølum til læring. Hetta var hart, men sera læruríkt bæði fyri lærarar og næmingar.

## Skúlaleiðslurnar mugu hjálpa til

Um tað skal eydnast at flyta fokus frá próvtølum til læring, má alt toymið hava felags linju, og tað besta er, at leiðslan er við. Tað nyttar lítið, at bara nakrir lærarar ikki geva próvtøl. Á Føroya Handilsskúla valdi leiðslan, at næmingar á fyrsta ári á A- og B-stigi á trý ára HH, og seinni á Búskaparbreytini, ikki skuldu fáa nakað próvtal tað fyrsta árið, men á C-stigi fingu teir próvtøl um jóltíðir. Í dag høvdu vit ikki droymt um at farið aftur til ta gomlu tíðina, tá ið næmingar fyrstu vikurnar fingu eitt próvtal. Smátt um smátt hava vit skapt eina eftirmetingarmentan. Tað næsta stigið kundi verið, at vit als ikki geva næmingum próvtøl, fyrr enn teir skulu hava støðumet, ársmet ella royndarpróvtal.

# Keldur

Morten Mikkelsen, *Afskaf karaktererne,* Kristeligt Dagblad 23.12.2015

Olav Absalonsen, *Námsfrøðilig leiðsla*, s. 10-17, Miðnámsrit 5, mars 2015

Olav Absalonsen, *Næmingar og ymiskleiki*, s. 20-31, Miðnámsrit 6, juni 2015

# Klára dreingir seg betur til próvtøkur enn gentur?

Olav Absalonsen

**Svarið er ja, um vit samanbera próvtøkumet við ársmet, sum hvør næmingur fær í somu lærugrein í sama skúlaári. Tað vísir ein kanning, sum er gjørd á Føroya Handilsskúla. Kanningin er ikki um, hvørt dreingir ella gentur klára seg betur í skúlanum, men leggur hon seg einans eftir at kanna munin ímillum ársmet og próvtøkumet. Hagtalsgrundarlagið er 815 karakterpør (815 ársmet og 815 próvtøkumet), har 444 karakterpør eru til gentur og 371 til dreingir.**

Í sambandi við eina ritgerð var ætlanin at kanna munin ímillum ársmet og próvtøkumet í lærugreinum við munnligum próvtøkum og í lærugreinum við skrivligum próvtøkum og at samanbera hesar munir. Karakterpør vórðu skrásett, sum skuldu brúkast til kanningina. Men meðan eg blaði ígjøgnum prógvini, leggi eg til merkis, at hjá gentum er próvtøkumiðal ofta lægri enn ársmiðal, og at hjá dreingjum er tað meira javnt, onkuntíð hægri og onkuntíð lægri.

Kanningin, sum byggir á tøl frá próvtøkum í 2006 og 2007, vísir, at í munnligum próvtøkum fingu dreingir í HH lægri ársmet enn gentur í miðal, men at dreingir fingu hægri próvtøkumet enn gentur í miðal. Í FHS fingu gentur somuleiðis hægri ársmet í munnligum enn dreingir, og tær fingu eisini hægri próvtøkumet enn dreingir í miðal, men her var munurin minni enn í ársmetunum, so her var tendensurin tann sami sum í HH.

Í skrivligum líktust HH og FHS eisini. Í HH var eingin munur á ársmetum hjá gentum og dreingum í miðal, men próvtøkumetini hjá dreingum vóru hægri enn hjá gentum. Í FHS fingu gentur heldur betri ársmet enn dreingir í skrivligum, men próvtøkumetini hjá dreingjum vóru betri enn hjá gentum.

## Kanning av hagtølunum

Mynd 1, 2 og 3 eru stabbamyndir, ið vísa, hvussu býtið er á muninum ímillum ársmet og próvtøkumet. Vatnrætta ásin gongur frá -4 til 5; hetta eru karakterstig eftir 13-stiganum. Tey negativu tølini merkja, at ársmetið er lægri enn próvtøkumetið; positiv tøl merkja, at ársmetið er hægri enn próvtøkumetið. Stabbarnir í null vísa, hvussu nógv talpør hava sama ársmet og próvtøkumet. Fyri betur at kunna samanbera er loddrætta ásin í prosentum.

Í mynd 1 sæst, at 68% av próvtøkumetunum í FHS eru eitt karakterstig frá ársmetinum ella tað sama sum ársmetið; tað merkir, at 32% av próvtøkumetunum í FHS eru tvey karakterstig ella meir frá ársmetinum. Í mynd 2 síggja vit, at í HH eru 80% av próvtøkumetunum eitt karakterstig frá ársmetinum ella tað sama sum ársmetið; tað merkir, at 20% av próvtøkumetunum í HH eru tvey karakterstig ella meir frá ársmetinum. Í mynd 3, har tølini eru løgd saman, sæst, at 75% av próvtøkumetunum í FHS og HH eru eitt karakterstig frá ársmetinum ella tað sama sum ársmetið; og merkir tað, at 25% av próvtøkumetunum eru tvey karakterstig ella meir frá ársmetinum. Hesi tøl eru eins fyri gentur og dreingir, men legg til merkis, at tey fella ikki líka báðumegin null hjá gentum og hjá dreingjum.

Mynd 1: Býti av muni ímillum ársmet og próvtøkumet í FHS




Mynd 2: Býti av muni ímillum ársmet og próvtøkumet í HH



Mynd 3: Býti av muni ímillum ársmet og próvtøkumet í HH og FHS




Myndirnar vísa týðiliga, at munur er ímillum stabbarnar fyri dreingir og stabbarnar fyri gentur. Men hann er ikki so stórur, at vit kunnu gera nakra niðurstøðu út frá hesum. Tí mugu vit gera eina hagfrøðiliga test av tølunum. Í talvu 1 eru tøl roknað at gera eina sonevnda t-test, sum er egnað í hesum førinum. N er talið á pørum við ársmeti og próvtøkumeti. D er Y-X, har Y er ársmet og X er próvtøkumet. Standardfrávik, sum er ferrótin av variansinum, er ein stødd, sum sigur, hvussu stór spjaðingin er í hagtølunum; standardfrávikið er miðal frávikið frá D.

Talva 1: Hagtalstilfar til t-test.

| | FHS | HH | FHS og HH |
|---|---|---|---|
| N (gentur) | 168 | 276 | 444 |
| D (gentur) | 0,565 | 0,330 | 0,419 |
| Variansur (gentur) | 2,427 | 1,553 | 1,892 |
| Standardfrávik (gentur) | 1,558 | 1,246 | 1,375 |
| N (dreingir) | 184 | 187 | 371 |
| D (dreingir) | 0,201 | 0,005 | 0,102 |
| Variansur (dreingir) | 2,588 | 1,478 | 2,033 |
| Standardfrávik (dreingir) | 1,609 | 1,216 | 1,426 |
| Variansur | 2,511 | 1,523 | 1,956 |
| Standardfrávik | 1,585 | 1,234 | 1,399 |
| T | 2,158 | 2,788 | 3,207 |
| P-virði | 0,015 | 0,003 | 0,001 |

Talið D (gentur) vísir, at próvtøkumetini hjá gentum eru í miðal 0,419 karakterstig lægri enn ársmetini, har 444 karakterpør eru við í kanningini. Hjá dreingjum eru próvtøkumetini í miðal 0,102 karakterstig lægri enn ársmetini, har 371 karakterpør eru við í kanningini. Hagtølini siga, at D fyri gentur er størri enn D fyri dreingir, men fyri at vita,

hvussu signifikantur munurin er, viðgera vit hetta við góðkendari hagfrøðiligari meting. Vit byrja við at gera hesa hypotesu: $H_1$: D (gentur) > D (dreingir).

Vit kunnu ongantíð prógva hypotesuna til fulnar, men vit kunnu falsifisera eina hypotesu, um sannlíkindini fyri, at hon passar, eru lítil. At falsifisera merkir her at avnokta ella at vraka. Tí testa við andsøgnina til $H_1$: $H_0$: D (gentur) ≤ D (dreingir). Her kemur t-testin inn, ið kann verða brúkt, tá ið býtið líkist normalbýtinum, sum tað sæst í myndunum 1, 2 og 3, at tað ger her.

T í talvu 1 er roknað út frá muninum ímillum D (gentur) og D (dreingir), variansunum og N, soleiðis at T verður stórt, um munurin ímillum D (gentur) og D (dreingir) er stórur, um variansurin er lítil, og um N er stórt.[1] Størri T er, minni verður P-virðið, sum er eitt tal fyri sannlíkindini fyri at vit taka feil, um vit vraka $H_0$.

Í teiginum fyri FHS er P-virðið 0,015, og tað merkir, at um vit vraka $H_0$, so er 1,5% møguleiki fyri, at vit taka feil. Í teiginum fyri HH er P-virðið 0,003, so her er 0,3% møguleiki fyri at taka feil, um vit vraka $H_0$. Í felags teiginum, har tølini fyri FHS og HH eru løgd saman, er P-virðið 0,001, so her er møguleikin 0,1% fyri at taka feil, um vit vraka $H_0$. Vit kunnu siga tað soleiðis, at eftir hesi kanning at døma er 99,9% vist, at dreingir klára seg betur til próvtøkur enn gentur samanborið við ársmetið, sum næmingurin hevur fingið.

Ein kanning av hesum slag skal altíð takast við tí fyrivarni, at einki liggur fjalt í hagtølunum, sum kann hava skeiklað myndina. Tað hava vit ikki grund til at halda, tí myndin er tann sama í skrivligum og munnligum próvtøkum og í tveimum ymiskum útbúgvingum, sum gaman í eru á sama skúla. Aftur at tí skulu vit taka við, at nógvir lærarar og uttanhýsis próvdómarar hava dømt og givið metini.

## Kjak

Spurningurin, hví dreingir fáa betri próvtøkumet í mun til ársmet, enn gentur fáa, er opin til kjak og til víðari gransking. Í tosi millum lærarar koma ofta hugskot um, hví hetta man vera so. Eitt boð er, at gentur flest duga betur at røkja sínar skyldur ígjøgnum árið enn dreingir, og tað ger, at tær fáa betri ársmet; tá ið so próvtøkan kemur, verður avdúkað, at hesi ársmetini eru verri at halda hjá teimum hugagóðu enn hjá teimum, sum hava tikið sær av løttum ígjøgnum árið. Hetta sjónarmiðið kann tykjast heldur ivasamt, tí tað, at ein næmingur røkir sínar skyldur í árinum, skuldi ikki bara sæst aftur í ársmetinum, men eisini í próvtøkuavrikinum.

Mike Nicholson á Oxford University, har dreingir ár eftir ár klára seg betur í próvtøkum enn gentur, vil vera við, at dreingir tora betur at taka kjansir og vága meira í próvtøkum

[1] $T = \frac{Miðal\ (gentur) - Miðal\ (dreingir)}{\sqrt{\frac{s^2}{n}(gentur) + \frac{s^2}{n}(dreingir)}}$

enn gentur, og tað sæst aftur í úrslitunum. Dreingir sum heild fylgja ofta tí, sum teir hava varhugan av, tá ið teir ikki vita við vissu, meðan gentur eru sum heild meira varnar. Øll eru ikki samd við Nicholson í hesari grundgeving. Til dømis vísir Averil MacDonald á kanningar, sum siga, at gentur sum heild klára seg betur enn dreingir í hægri út-búgvingum. Hon viðgongur tó, at dreingir duga ofta betur at sálda tað frá, sum er óvið-komandi í einari uppgávuorðing. Men spyrt tú ein og hvønn lærara, fært tú at vita, at gentur ofta eru betur skipaðar at fáa uppgávur og innlatingar frá hondini innan ásetta tíð. Hóast tey bæði Nicholson og MacDonald kunnu tykjast eitt sindur ójøvn á máli, so stuðla bæði upp undir úrslitið av tí føroysku kanningini, sum ikki snýr seg um, hvørt gentur ella dreingir klára seg betur í skúlanum, men at dreingir klára seg relativt betur í próvtøkum.

Nógv bendir á, at persónligheitin hjá næminginum hevur týdning í sambandi við próv-tøkur. Tað er sum so einki løgið í, at stórur munur kann vera ímillum ársmet og próvtøku-met. Ársmet verða givin út frá nógvum metingarháttum, meðan próvtøkumet byggja bara á ein metingarhátt, og soleiðis sum próvtøkur hava verið og eru á FHS og HH (nú bú-skaparbreyt), er próvtøkan antin skrivlig ella heilt munnlig. Í báðum førum er næmingurin púra einsamallur í próvtøkustøðuni. Og lítil ivi er um, at misjavnt er, hvussu næmingar trívast í hesi støðu, og hvussu teir klára seg í henni.

Tí er ikki av leið at hyggja at myndlum um næmingar og ymiskleika. Í Miðnámsriti 6 var ein grein um hetta evnið, har tveir myndlar um intellektuella mennning hjá næminginum vórðu nevndir: Perry myndilin um intellektuella og etiska búning og tann reflektivi metingarmyndilin hjá King og Kitchener. Tann epistemologiski reflektiónsmyndilin hjá Baxter Magolda um intellektuella menning, sum setir fokus á munin ímillum kynini í ymsum stigum um vitan, var ikki við í nevndu grein. Hann er í 4 stigum:

1. Í tí absolutta vitanarstignum (absolute knowing) hava fleiri kvinnur enn menn móttakandi mynstur í hugsanarhátti[2], meðan fleiri menn enn kvinnur hava eitt mastery mynstur.
2. Á øðrum stigi (transitional knowing) hava fleiri kvinnur enn menn inter-persónligt mynstur í hugsanarhátti, meðan fleiri menn enn kvinnur hava eitt ópersónligt mynstur.
3. Og á tí triðja og sjálvstøðuga stignum (independent knowing) hava fleiri kvinnur enn menn inter-individuelt mynstur í hugsanarhátti, og fleiri menn enn kvinnur hava eitt individuelt mynstur.
4. Á tí fjórða og hægsta stignum (contextual knowing) eru mynstrini í hugsanarhátti hjá kvinnum og monnum meira lík. Sera fáir miðnámsnæmingar eru á hesum stigi.

Tá ið hesir eginleikar úr myndlinum hjá Baxter Magolda verða settir í samband við tey úrslit, sum vit eru komin til í kanningini á Føroya Handilsskúla, er skjótt at seta sær

---

[2] Á eingilskum: reasoning pattern

spurningin, um dreingir ikki klára seg relativt betur til próvtøkur enn gentur samanborið við ársmet, tí at próvtøkustøðan er einsamøll og ópersónlig, og at hetta er ein meinbogi fyri fleiri kvinnur enn menn í flestu intellektuellum stigum. Og tá ið vit hugsa um, at ársmet eru grundað á fleiri metingarhættir, enn próvtøkumet eru, og helst eru meira eftirfarandi enn próvtøkumet, fær tað ein at spyrja, um próvtøkur ikki diskriminera ávísar næmingar, serliga kvinnuligar.

## Keldur

Magolda, Marcia B. Baxter. 2004, Making Their Own Way, Narratives for Transforming Higher Eduction to Promote Self-Development, Stylus, Sterling, Virginia.

Moreton, Cole. 2013. Why boys are better at exams, according to Oxford University chief, The Telegraph, 18 Aug.

Williams, Amanda. 2013. Boys do better in exams than girls because they are ‘more willing to take risks’, says Oxford University head of admission, Daily Mail, 18 August.